# Álit um

# javning av almannaveitingum

juni 1996

## I. INNGANGUR

Landsstýrið avgjørdi 29.11.1995 at seta niður arbeiðsbólk við umboðum fyri Almannastovuna, Hagstovuna og Almanna- og Heilsudeildina at koma við tilmæli um javning av almannaveitingum.

Í bólkinum hava sitið:

Karsten Saxov, Almannastovan
Hans Pauli Strøm, Hagstovan
Maria Jacobsen, Almanna- og Heilsudeildin.

Arbeiðssetningurin, sum ikki var nærri útgreinaður, hvat endamálinum við arbeiði bólksins viðvíkur, var soljóðandi:

> (Bólkurin skal) *"koma við tilmæli og útrokning, hvat tað kostar at javna pensjónirnar sambært prístali ella broytingum í lønarlagnum".*

Uppgáva bólksins er sostatt:

1) at gera útrokningar av kostnaðinum av javning av almannaveitingum, um hesar blivu javnaðar eftir ávikavíst gongdini í prístalinum og lønargongdini, umframt
2) at koma við tilmæli um, hvussu almannaveitingarnar framyvir eiga av verða javnaðar.

### Tilmæli

Út frá kanninginii av, hvussu almannaveitingarnar fram til 1. juli 1993 hava verið javnaðar og út frá viðgerðini av verandi møguleikum at finna eitt hóskandi indeks fyri javning av almannaveitingum, mælir bólkurin til, at almannaveitingarnar framyvir verða javnaðar eftir *prístalinum* á tann hátt, at veitingarnar verða broyttar hvønn tann 1. juli eftir prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri fýra teir seinastu ársfjórðingarnar áðrenn 1. juli í mun til miðalprístali fyri fýra ársfjórðingar tíðarskeiðið frammanundan.

Tórshavn hin 25. juni 1996

| | | |
|---|---|---|
| *Karsten Saxov* | *Hans Pauli Strøm* | *Maria Jacobsen* |

## II. HVØRJAR VEITINGAR SKULU JAVNAST?

Fylgisskjal 1 er eitt yvirlit yvir tær veitingar, sum higartil hava verið umfataðar av regluligu javningini (reguleringini) av almannaveitingum.

Tað snýr seg um allar upphæddir, bæði veitingarupphæddir og frádráttarupphæddir, sum eru ásettar í ríkislógunum um fólka- og avlamispensjón, umframt gjøld og veitingar sb. nýggju løgtingslógina um barnagjald til einsamallar uppihaldarar.

Ásetanin av upphæddunum í nevndu lógum fær eisini ávirkan á aðrar veitingar, eitt nú fyribils hjálp vegna eina almannahending eftir forsorgarlógini og samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Tí má hetta eisini takast við í av fíggjarligum avleiðingum av javningini.

Bólkurin hevur tikið sum givið, at tað, eins og gjørt varð fram til og við 1.7.1993, framhaldandi eru allar upphæddir, sum skulu vera fyri somu regluligari javning. Hetta hóast tað kanska hevði verið relevant at skilt ímillum upphæddir, eftir hvat tær skulu dekka: vanliga livikostnaðin hjá móttakarum av almannaveitingum ella endurgjald fyri meirútreiðslur av sjúku/breki, sum í stóran mun í dag verða kompenseraðar á annan hátt. Men, sum sagt, hevur bólkurin ikki hildið, at tílíkir spurningar eru umfataðir av arbeiðssetninginum.

## III. ENDAMÁL VIÐ REGLULIGARI JAVNING

Fleiri møguleikar eru, tá tað snýr seg um javning av almannaveitingum. Hvønn møguleika, valt verður at nýta, veldst um, hvat *endamálið* við javningini er. Hetta er ikki orðað av landsstýrinum í arbeiðssetninginum. Var endamalið orðað, hevði rættasta framferðin verið at savna inn tilfar og sett saman eitt nýtt javningarindeks, sum tænti júst tí orðaða endamálinum. Lagt er ikki upp til hetta, og er uppgávan tí avmarkað til at vísa á eitt indeks úr verandi møguleikum.

Og eru teir, tá samanum kemur, avmarkaðir til:
1) eitt prístalsindeks og
2) eitt lønarindeks

Endamálið við javningini av føroysku almannaveitingunum hevur higartil verið *at tryggja samsvar millum almannaveitingar í Danmark og Føroyum*, hetta hóast munur kann hava verið á viðurskiftum, sum hava týdning í hesum sambandi, í báðum ríkispørtunum.

Eitt prístalsindeks hevur sum endamál at *varðveita keypiorkuna* hjá teim, sum liva av almannaveitingum, meðan eitt lønarindeks hevur til endamáls *at tryggja samsvar millum gongdina í inntøkuni hjá teim, ið liva av almannaveitingum og gongdina í inntøkuni hjá teim, ið liva av lønarinntøku.*

## IV. JAVNING AV VEITINGUNUM HIGARTIL

Almannaveitingarnar í Føroyum vórðu fram til 31. desember 1987 automatisk prístalsjavnaðar hvønn tann 1. januar og 1. juli eftir danska reguleringsprístalinum fyri ávikavíst undanfarna oktobur og apríl ársfjórðing.

Frá 1. juli 1991 vórðu tær javnaðar við einum sonevndum satsreguleringsprosentið, ið varð útroknað við støðið í gongdini í lønum hjá donskum LO-arbeiðarum.

Veitingarnar vórðu seinast javnaðar pr. 1. juli 1993 við +3,2 prosentum.

Donsku almannaveitingarnar vórðu pr. 1. januar 1994, við atliti til broytingar, sum vórðu framdar í donsku skattalógini (bruttoskattareforminum), lækkaðar við 2 prosentum. Fyri ikki at fáa eina ótilætlaða lækking av føroysku almannaveitingunum sum avleiðing av broytingum í donsku skattaskipanini, blivu ásetingarnar viðvíkjandi javning í fólkapensjóns- og avlamispensjónslógini og lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar við ríkislóg nr. 227 frá 6. apríl 1994 broyttar soleiðis, at veitingar í staðin skuldu javnast eftir nærri reglum, ásettum av heimastýrinum.

Ikki fyrr enn við løgtingslóg nr. 117 frá 2. des. 1994 varð føroyska ásetanin tó gjørd. Við hesi lóg og broyting í henni í løgtingslóg nr. 173 frá 22. desember 1995 hava almannaveitingarnar verið óbroyttar frá 1. juli 1993 til 31. desember 1996

Varð bruttoskattareformurin ikki settur í verk í Danmark, høvdu føroysku almannaveitingarnar ivaleyst framvegis verið javnaðar við danska satsregulerings-prosentinum, sum ásett við fólkatingslóg. Spurnartekin er ongantíð sett við hetta at javnað eftir donskum ásetingum síðan automatiska prístalsjavningin av pensjónum upprunaliga varð sett í gildi í 1959. Seinast í viðmerkingunum til lógarbroytingarnar, sum fingu gildi pr. 1 januar 1988, verður soleiðis staðfest,

*"...at der med hensynstagen til forskelle i beskatning m.v. som udgangspunkt (skal) sikres samme disponible indkomst for pensionsmodtagere på Færøerne som i Danmark".*

Ì roynd og veru hevur reguleringssatsurin verið hin sami, uttan mun til um hetta gav ella ikki gav somu disponiblu inntøku.

Varð hildið fram við javningini sambært donsku satsreguleringina hevði hækkingin verið 2,7% tann 1. januar 1994, 0,4% tann 1. januar 1995 og 2,4% tann 1. januar 1996.

Talva 1 niðanfyri vísur, hvussu gongdin hevði verið í árligu grundupphæddini, um hildið varð fram við javningini eftir donsku reglunum.

Talva 1.

**Broyting í grundupphæddini við framhaldandi**

**javning eftir donskum satsum**

| | 1.7.93 | 1.1.94 | 1.1.95 | 1.1.96 |
|---|---|---|---|---|
| Árlig Grund-upphædd | 47.784 | 49.080 | 49.272 | 50.460 |
| Indeks juli 1993=100 | 100 | 102 | 103 | 106 |

Mánaðarliga grundupphæddin fyri ein stakan pensjonist er í dag 3.982 kr.. Hon vildi í 1996 veri kr. 4.205, um hildið varð fram við javning eftir danska satsregulerings prosentinum aftaná 1. juli 1993.

Ein framhaldandi javning hevði havt við sær eina útreiðsluøking, sum víst í talvuni niðanfyri. Sí annars nærri greining í fylgisskjali 2.

Talva 2.
**Útreiðslan á økjum, sum eru ávirkað av javningini, um danska satsreguleringsprosentið varð brúkt 1994-96**

| | Faktisk nýtsla 1994 kr. | Við javning kr. | Faktisk nýtsla 1995 kr. | Við javning kr. | Nýtlsa 1996 (sb.fig.ætl.) kr. | Við javning kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur tilsamans | 432.506.816 | 444.184.499 | 414.628.684 | 427.523.636 | 430.712.000 | 454.831.872 |
| **Meirút-reiðslur tilsamans** | | **11.677.684** | | **12.894.952** | | **24.119.872** |
| Kommu-nurnar | | 788.244 | | 870.409 | | 1.628.091 |
| Lands-kassin | | 10.889.440 | | 12.024.543 | | 22.491.781 |

## V. PRÍSTALIÐ

Grundarlagið undir núverandi prístali eru upplýsingar, sum vórðu innsavnaðar frá 50 sonevndum prístalsfamiljum í 1972. Upplýsingarnar vórðu viðgjørdar í landsstýrinum, og varð prístalsgrundarlagið við nýtsluvektunum smíðað til nýggja prístalslóg, sum kom í gildi í 1975. Um sama mundi kom í gildi lóg um prístalsjavning av lønum.

Í 1980 varð lógin broytt við at prístalið varð sett aftur til 100. Samstundis varð avgjørt, at allar hækkingar, sum stóðust av innflutnings-, framleiðslu- og øðrum vørugjøldum aftaná 1.1.1980, skuldu haldast uttanfyri prístalsútrokningina. Hetta varð gjørt tí prístalslógin segði, at broytingar í hesum gjøldum ikki skuldu ávirka lønirnar, sum tá í stóran mun vóru prístalsviðgjørdar.

Prístalið aftaná 1980 og fram til endan av 1992 vísur tí ikki gongdina í brúkaraprísum. Talan er um eitt tillagað *reguleringsprístal.*

Longu í 1983 varð prístalið aftur sett til 100.

Frá ársbyrjan 1993 er grundleggjandi broyting gjørd í uppgerðini av prístalinum. Frá og við 1. ársfjórðingi 1993 vísur prístalið gongdina í brúkaraprísum, t.v.s. prísum íroknað avgjøld. Talan er sostatt nú aftur um eitt *brúkaraprístal.*

Avtøkan av prístalsviðgerðini av lønum hevði við sær, at ongin grund var til longur at halda avgjøldini uttanfyri í útrokningini. Í veruleikanum ber heldur ikki til at skilja út broytingina í avgjøldum, síðan farið varð frá *avgjaldsskipan* til *MVG-skipan.* Gamla prístalið kundi tískil ikki halda fram.

Tó skal viðmerkjast, at tað framvegis eru *vektirnar frá brúkarakanningini í 1972*, sum liggja til grund fyri útrokningini av prístalinum.

Fyri at kunna sambinda prístølini fyri 1993 við prístølini aftaná, eru prísirnir fyri seinasta ársfjórðing 1992 roknaðir bæði við og uttan hækkingina í avgjøldum síðan 1.1. 1980. Tí er broytingin í prístalinum frá 4. ársfjórðingi 1992 til 1. ársfjórðing 1993 íroknað øll avgjøld, meðan broytingin áðrenn 4. ársfjórðing 1992 er í prísunum uttan avgjøld.

Prísbroytingin, sum stóðst av umleggingini til MVG, er týðulig í teim nýggju prístalsútrokningunum. Prístalið hækkaði frá 138,7 í 4. ársfjórðingi 1992 til 147,9 í 1. ársfjórðingi 1993, t.v.s. við 6,6% og við 1,4 %´s vøkstri aftur fram til 2. ársfjórðing 1993. Sí fylgisskjal 3.

Roknast kann við, at hesin vøksturin uppá 8% í brúkaraprísinum í høvuðsheitinum stavar frá avgjaldsumleggingini. Vøksturin samsvarar eisini væl við tað, sum Hagstovan, áðrenn MVG´ið varð sett í verk, roknaði við, at hetta fór at broyta prísirnar. Tann størsti prísvøksturin var á orku, lutvíst tí avgjald frammanundan ikki var á ravmagni og lutvíst tí innflutningsgjaldið á olju var sera lágt.

**Prístalið sum javningarindeks**

Brúkaraprístalið hevur leingi og frá nógvum síðum verið fyri kritikki gjøgnum árini. Høvuðskritikkurin hevur verið vendur móti nýtsluvektunum, ið ikki eru endurskoðaðar, síðan prístalsgrundarlagið upprunaliga varð lagt í 1972-75. Nógvar vørur og tænastur, sum framvegis eru við í prístalsútrokningini, eru í størri ella minni mun horvnar úr nýtsluni hjá vanliga húsarhaldinum tey seinastu 20-25 árini, samstundis sum fleiri nýggjar vørur og tænastur eru komnar síðan, sum ikki eru við í prístalsútrokningini. Við øðrum orðum er nýtslan hjá føroyska húshaldinum munandi broytt síðan fyrst í sjeytiárunum, serliga hvat samanseting av nýtsluni viðvíkur.

Fyri bert at nevna ein vørubólk, sum funnist hevur verið at, kann nevnast *býli*. Ì 1993 telur hetta við somu vekt sum í 1972-75! Vektin er knappliga 11 eindir av 100. Umframt hetta er av týdningi at viðmerkja, at grundstykkjaprísir, húsaleiga og fíggingarútreiðslur av sethúsum als ikki telja við. Tað gera einans útreiðslur til byggi- og viðlíkahaldstilfar so sum timbur, máling, sement o.a.

Eina hóming av, at føroyska prístalið er heldur ivasamt mát í mun til vektingina, kunnu vit fáa við at hyggja eftir tí danska prístalinum - sí fylgisskjal 4. Hetta, hóast vørubólkarnir ikki kunnu samanberast beinleiðis og hóast samanbering ikki kann gerast beinleiðis millum føroysk og donsk viðurskifti.

Hóast hetta fyrivarni eru viðurskifti, sum tala fyri, at prístalið í hesum sambandi kortini kann nýtast sum eitt javningarindeks.

*Í fyrsta lagi* er prístalið einasta offisiella prístalsindeksið, sum vit hava. Soleingi sum løgting og landsstýri ikki hava hildið, at neyðugt hevur verið at gera eitt nýtt og bøtt prístalsgrundarlag, er hetta prístalið politiskt sanktionerað, góðtikið, at brúka sum indeks fyri gongdina í brúkaraprísum í Føroyum.

*Í øðrum lagi* er kritikkurin av teim gomlu nýtsluvektunum í prístalinum kanska ikki so relevantur, sum hildið hevur verið. Í riti sínum “Hvor meget vejer en færøsk børnefamilie” (ikki publ., dagf. 8.4.96) vísir Vøgg Løwe Nielsen á, at tað einans hevði havt lítla ávirkan á føroyska heildarprístalið (total-indeksið), um nýtlsuvektirnar blivu broyttar, ella um heilt aðrar vórðu nýttar. Tað er einans undir *óvanligum* umstøðum, tá serliga stórar broytingar henda, eitt nú í oljuprísum ella avgjaldsskipanum, at ymiskar vektir geva ymisk úrslit í heildarindeksinum. Hinvegin heldur VLN, at júst avgjaldsumleggingin til MVG í 1993 hevur havt so avgerandi ávirkan á nýtlsuútreiðslurnar í Føroyum, at tíðin er komin at endurskoða vektgrundarlagið.

Júst til hetta seinasta er at nevna, at í einum nýggjum samstarvi millum Hagstovu Føroya og Danmarks Statestik er eitt av málunum at kanna eftir, um eitt nýtt nýtsluvektgrundarlag kann fáast til vega úr verandi hagtalsligum keldum.

*Í triðja lagi* kann illa hugsast annað, enn at stig skjótt verða tikin til frá politiskari síðu at viðgera og fremja møguligar broytingar/ábøtur í verandi prístalið, soleiðis at hetta lýkur tær treytir, ið mugu setast einum haldgóðum brúkaraprístali.

Vórðu almannaveitingarnar í tíðarskeiðnum frá 1.7.93 og frameftir javnaðar hvønn 1. juli eftir prosentvísu broytingini í føroyska miðalprístalinum fyri ársfjórðingarnar juli, oktobur, januar og apríl frammanundan *í mun til sama* tíðarskeið áðrenn hetta, hevði gongdin í grundupphæddini verið sum víst í talvuni niðanfyri.

Talva 3.

**Regulering av grundupphæddini eftir føroyska prístalinum.**

| | 1.7.93 | 1.7.94 | 1.7.95 | 1.7.96 |
|---|---|---|---|---|
| Árlig Grund-upphædd | 47.784 | 50.352 (5,37%) | 51.996 (3.28%) | 53.316 (2,53%) |
| Indeks juli 1993=100 | 100 | 105 | 109 | 112 |

Av umsitingarligum orsøkum er mest praktiskt at nýta 1. juli sum reguleringsdag, tí pensjónirnar verða inntøkuviðgjørdar undan 1. Januar.

Í fylgisskjali 3 verður víst, hvussu komið er fram til útrokningargrundarlagið fyri javningini.

Meirútreiðslur landskassans høvdu, um javnað varð á hendan hátt í 1994-1996 ætlandi verið sum víst í talvu 4 niðanfyri. Útrokningargrundarlagið er hitt sama sum í talvu 2.

Talva 4.

**Útreiðslan á økjum, sum eru ávirkað av javningini, um føroyska prístalið varð brúkt 1994-96**

| | Faktisk nýtsla 1994 kr. | Við javning eftir prístalinum | Faktisk nýtsla 1995 kr. | Við javning eftir prístalinum | Nýtlsa 1996 (sb.fig.ætl.) kr. | Við javning eftir prístalinum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur tilsamans | 432.506.816 | | 414.628.684 | | 430.712.000 | |
| **Meirút-reiðslur tilsamans** | | **11.634.433** | | **29.450.922** | | **43.943.710** |

Í talvuni sæst, hvussu áður umtalaða stóra prístalshækkingin, ið stóðst av umleggingini til MVG, hevði sæst aftur í útreiðslum landskassans í 1994 og 1995, um almannaveitingarnar vórðu javnaðar eftir prístalinum. Slíkar hækkingar eru tó, sum eisini víst á, óvanligar í mun til, hvussu gongdin í prístalinum annars hevur verið.

Broytingin í prístalinum, roknað sum omanfyri ásett, verður mett at blíva 2,18 % fyri juli 1996 - juli 1997. Hetta út frá gongdini í prístalinum seinastu ársfjórðingarnar. Heldur hetta, verður meirútreiðsla landskassans mett at fara at blíva umleið 4,4 mió. kr. fyri seinna hálvár í 1997, um valt verður at javna eftir prístalinum frá 1. Juli 1997 at rokna á tann hátt, sum omanfyri er sett upp. Hetta út frá teirri fyritreyt, at útreiðslurnar fyri 1997 verða óbroyttar í mun til fíggjarætlanina fyri 1996.

## VI. Lønarindexið

Ongi inntøkuviðurskifti í Føroyum í dag verða javnað eftir prísgongdini. Automatiska prístalsjavningin av lønum varð tikin av í 1990. Tað kann tí tykjast øvugt at almannaveitingarnar hereftir, sum tær einastu inntøkurnar, skulu prístalsjavnast. Hinvegin verða inntøkuviðurskiftini fyri allar løntakarar avtalað millum partarnar eftir oftast 2-ára sáttmálum. Og talast kann tí fyri, at almannaveitingarnar fylgja sáttmálabroytingunum og harvið lønargongdini í samfelagnum.

Sáttmálarnir eru nógvir og ymiskir. Munirnir í lønarstigi o.ø. viðurskiftum (t.d. eftirlønarviðurskiftum) eru ógvuliga stórir millum teir ymisku løntakarabólkarnar. Men verður hugt eftir teim lutfalsligu árligu broytingunum í sáttmálalønum, so er so at siga ongin munur: broytingin er lutfallsliga hin sama fyri tær ymsu sáttmálalønirnar.

Eitt javningarindeks hevði sostatt verið hitt sama, var tað gjørt eftir arbeiðsmannalønum ella eftir tænastumannalønum.

Javningarindeksið kundi tí verði gjørt beinleiðis eftir teim árligu broytingunum í lønunum, sum verða ásettar í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag (grein 1 a, ið er tímalønin íroknað 0.9%-ískoyti frá 1.5.1989, 1% til sosialan tryggingargrunn frá 1.5.1989 og frítíðarløn, ið varð sett niður úr 12 í 10,255 tann 1.5.1993 og uppaftur í 12% tann 1.5.1996). Støðið verður tikið í hesum sáttmála, tí hann er hin mest vanligi og einfaldi.

Gongdin í sáttmálalønum hevur hesi seinnu árini verið heilt óvanlig. Ikki fyrr enn nú í mei 1996 er arbeiðaralønin komin uppá sama støði, sum hon var í 1993. Tí hevur eisini hesi árini verið eitt glopp millum gongdina í prístali og sáttmálalønum, sum tað sæst í fylgisskjali 5.

## Lønarindeks sum javningarindeks

Fyri eitt sparisjónarmið kundi tað veri freistandi at avgjørt at javnað almannaveitingarnar eftir sáttmálalønunum.

Men fylgisskjal 5 vísur eisini, at vit ikki skulu langt aftur fyri at síggja øvugtu gongdina: at eitt indeks fyri lønargongdina liggur javnt og samt væl omanfyri prístalsindeksið. Og eingin kann siga, at hetta mynstrið ikki endurtekur seg um nøkur ár.

Tað er tí eisini óvist, um nakað hald er í tí sparisjónarmiðnum, at tað er bíligast fyri landskassan at lata almannaveitingarnar fylgja einum lønarindeksi. Tað kann um nøkur ár vísa seg at vera dýrara loysnin.

Spurnartekin kann eisini setast við at nýtsluna av gongdini í lønarindeksinum sum ímynd av lønargongdini. *Sáttmálalønin er jú ikki altíð tann veruliga lønin*, ið goldin verður. Hon vísur ikki lønarglíðingar og lønardifferentieringar, ið kunnu vera. Hóast tílík fyribrigdi munnu vera sjáldsom í júst krepputíðum, ber ikki til at síggja burtur frá teimum. Tey kunnu heilt skjótt taka seg uppaftur, ikki minst um aðrar nýggjar vinnur taka seg upp, t.d. oljuvinnan.

Sum er ber ikki til at út frá lønartølunum, ið koma gjøgnum Toll- & Skattstovuna, at rokna út, hvat *veruliga* tímalønin er. Hetta hevði tó kunnað lati seg gjørt við einans smávegis broyting: at øllum lønútgjaldarum varð álagt, umframt lønarupphæddina, eisini at upplýsa tímatalið handan útgoldnu upphæddina.

Eitt lønarindeks eftir sáttmálalønum kann also bert lutvíst fylgja veruligu lønargongdini. *Uppaftur minni kann eitt lønarindeks sigast at lýsa gongdini í inntøkuviðurskiftunum*: tey í vinnuførum aldri og við fullum vinnuførleika hava ein (meira ella minni avmarkaðan) møguleika at reglurera/supplera/ávirka sína inntøku við at arbeiða meira ella minni, yvirarbeiða, eykaarbeiða, skifta arbeiði, avansera við útbúgving, við ansienniteti - alt tað kann ein pensjonistur vanliga ikki. Tí verður ein binding av almannaveitingum til lønarindeksið í realitetinum ein binding til avgjørda minstuløn.

Talvan niðanfyri vísur gongdina í grundupphæddini, um hon síðan 1.7.93 hevði verið javnað eftir lønarindeksinum.

Talva 6.
**Regulering av grundupphæddini eftir lønarindeksi**

| | 1.7.93 | 1.7.94 | 1.7.95 | 1.7.96 |
|---|---|---|---|---|
| Árlig Grund-upphædd | 47.784 | 47.784 | 47.784 | 48.060 |
| Indeks juli 1993=100 | 100 | 100 | 100 | 102 |

Vórðu almannaveitingarnar javnaðar eftir lønargongdini høvdu útreiðslurnar verið óbroyttar í 1994 og 1995.

Høvdu almannaveitingarnar verið javnaðar eftir broytingini í tímalønini sambært FA/FAG-sáttmálan frá mai 1995 til mai 1996, hevði talan verið um eina hækking uppá 1,57% og hevði meirútreiðslan av hesum fyri seinna hálvár 1996 verið **3,1** mió kr. Hetta sambært fíggjarætlanina fyri 1996.

## VII. Samandráttur og niðurstøða

Sum víst á, hava føroysku almannaveitingarnar higartil verið javnaðar eftir donskum reglum, uttan at spurnartekin nakrantíð hevur verið sett við tað henta/rímiliga í hesum. Grundleggjandi broyting í donsku skattaskipanini og avleiðingarnar av hesi fyri regluligu javningina av almannaveitingina, gjørdu tað eyðsýnt, at tað ikki longur bar til at nýta danskar reglur fyri føroysku veitingarnar. Tí kom spurningurin um, hvussu føroysku almannaveitingarnar framyvir skulu javnast, á dagsskránna.

Sum er, eru tveir møguleikar: javning eftir prístalinum ella lønargongdini.

Verða tillagingar/broytingar gjørdar í vektgrundarlagnum, fer pristalið at lýsa veruligu gongdina í brúkaraprísunum, og kemur tað tí at tæna endamálinum, ið er við nýtsluni av tí sum javningarmát, nevniliga at varðveita keypiorkuna hjá teim, ið liva av almannaveitingum.

Endamálið við at nýta broytingar í lønargongdini sum mát í javningini er at tryggja, at lutfallið millum inntøkuna hjá móttakarum av almannaveitingum og inntøkuna hjá teim, ið liva av arbeiðsinntøku, verður varðveitt. Sum mát fyri lønargongdini ber til at nýta prosentvísu broytingina í sáttmálalønum, sum vísur seg at verða umleið hin sama, uttan mun til, hvør sáttmáli verður nýttur.

Men, sum víst á, er tað einans við stórum fyrivarni, at sigast kann, at sáttmálalønin og broytingar í henni standa sum mát fyri *veruligu* lønina, enn minni sum mát fyri *inntøkuni* hjá fólki.

Niðurstøðan er tí, at úr verandi møguleikum tænir føroyska prístalið best sínum endamáli. Tí verður mælt til at nýta hetta í javningini av almannaveitingum framyvir.

Bólkurin skal tó mæla landsstýrinum til at seta í gongd arbeiði *at endurskoða prístalsgrundarlagið*, soleiðis at hetta kemur at lúka tær treytir, sum mugu setast einum haldgóðum brúkaraprístali.

## VIII. Uppskot til løgtingslóg um javning av almannaveitingum

**§ 1.** Við heimild í ríkislóg fyri Føroyar um fólkapensjón, sb. lógarkunngerð almannamálaráðseins nr. 103 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við ríkislóg nr. 1131 frá 21. desember 1994, ríkislóg fyri Føroyar um avlamispensjón o.a., sb. lógarkunngerð almannamálaráðsins nr. 101 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við ríkislóg nr. 1131 frá 21. desember 1994 og løgtingslóg nr. 71 frá 20. mai 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. verða almannaveitingarnar frá og við 1. juli 1997 javnaðar eftir føroyska prístalinum sum ásett í §§ 3-5.

**§ 2.** Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, umframt tær ymsu frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 1 nevndu lógum eru sum ásett í skjali 1.

**§ 3.** Upphæddirnar í skjali 1 verða tann 1. juli á hvørjum ári javnaðar við prosentvísu broytingini í miðalprístalinum fyri undanfarni fýra ársfjórðingarnar juli-apríl í mun til miðalprístalið fyri somu ársfjórðingar frammmandun.

**§ 4.** Tær soleiðis javnaðu árligu veitingarupphæddirnar verða avrundaðar til nærmasta krónutalið, ið kann býtast við 12, meðan frádráttarupphæddirnar verða avrundaðar til nærmasta krónutalið, ið kann býtast við 100.

**§ 5.** Hagstova Føroya roknar út javningarprosentið og Landsstýrið ásetur javnaðu almannaveitingarnar, ið verða kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum í seinasta lagi 1. august.

**§ 6.** Lógin fær gildi frá 1. juli 1997.

Av tí at neyðugt er at gera konsekvensbroytingar í § 23, stk. 2 í løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar, verður skotið upp samstundis at broyta § 23 í nevndu lóg soleiðis:

**Broytingaruppskot:**

§ 23...
*Stk. 2.* Broyting í tí vanliga gjaldinum við gildi frá einum 1. juli, hevur gildi fyri tey gjøld, sum forfella aftaná hesa dagfesting.

**Galdandi orðing:**

§ 23....
*Stk. 2.* Broyting í tí vanliga gjaldinum við gildi frá einum 1. apríl ella 1. oktober, hevur gildi fyri tey hálvársgjøld, sum forfella aftaná hesa dagfesting.

# Almannaveitingar pr.1.7.1993

| Satsir | pr. ár | pr. mðr. | |
|---|---|---|---|
| Grundarupphædd hjún bæði | 37.968 | 3.164,00 | |
| Grundarupphædd hjún annað og støk | 47.784 | 3.982,00 | |
| Hálv grundarupphædd | 23.892 | 1.991,00 | |
| Hálv hálv grundarupphædd | 11.964 | 997,00 | |
| Hálv + hálv grundarupphædd | 19.008 | 1.584,00 | |
| Avlamisviðbót heil (hjún bæði) | 19.068 | 1.589,00 | |
| Avlamisviðbót heil hjún annað og støk | 22.260 | 1.855,00 | |
| Avlamisviðbót hálv (hjún bæði) | 9.552 | 796,00 | |
| Avlamisviðbót hálv (hjún annað og støk) | 11.124 | 927,00 | |
| Avlamisviðbót heil + hálv | 5.568 | 464,00 | |
| Avlamisveiting hjún bæði | 17.412 | 1.451,00 | |
| Avlamisveiting hjún annað + støk | 21.432 | 1.786,00 | |
| Avlamisveitying hjún (hin fær avl.veiting) | 5.568 | 464,00 | |
| Avlamisveiting (fólkapens við avl.veiting) | 4.716 | 393,00 | |
| Hjúnarbandsviðbót | 4.200 | 350,00 | |
| Pensjónsviðbót (hjún bæði) | 11.136 | 928,00 | * |
| Pensjónsviðbót (støk+hjún annað) | 7.380 | 615,00 | * |
| Bíðiviðbót hjún bæði 5 ár | 5.616 | 468,00 | |
| Bíðiviðbót hjún annað + støk 5 ár | 3.624 | 302,00 | |
| Bíðiviðbót hjún bæði 3 ár | 3.660 | 305,00 | |
| Bíðiviðbót hjún annað + støk 3 ár | 2.496 | 208,00 | |
| Bíðiviðbót einligar kvinnur 5 ár | 1.776 | 148,00 | |
| Bíðiviðbót einligar kvinnur 3 ár | 816 | 68,00 | |
| Bíðiviðb. hjún bæði 5 ár áðrenn 1/4- 1961 | 3.816 | 318,00 | |
| Bíðiviðb. hjún bæði 67 ár áðrenn 1/4- 1961 | 2.388 | 199,00 | |
| Bíðiv.b. hjún a. + støk 67 ár áðrenn 1/4-1961 | 1.548 | 129,00 | |
| Bíðiv.b. hjún a. + støk 70 ár áðrenn 1/4-1961 | 2.520 | 210,00 | |
| Hjálparviðbót | 22.260 | 1.855,00 | |
| Hjálparviðbót (fólkapensjón við avlamisv.) | 4.716 | 393,00 | |
| Røktarviðbót | 44.412 | 3.701,00 | |
| Óarbeiðsførisviðbót hjún bæði | 22.320 | 1.860,00 | |
| Óarbeiðsførisviðbót hjún annað + støk | 30.852 | 2.571,00 | |
| Aldursviðbót hjún bæði | 6.264 | 522,00 | |
| Aldursviðbót hjún + støk | 3.936 | 328,00 | |
| Aldursviðb. hjúnaðarfelagið yngri enn 80 ár | 2.088 | 174,00 | |
| Aldursviðb. hjúnaðarf. fær lægstu avlamisp. | 3.156 | 263,00 | |
| Aldursviðb. hjúnaðarf. fær miðal/hægstu avlamisp. | 2.628 | 219,00 | |
| Lummapening omanfyri 60 ár | 7.512 | 626,00 | |
| Lummapening niðanfyri 60 ár | 9.012 | 751,00 | |
| Vanligt barnagjald - fyri pápan smb. § 4 | 8.028 | 669,00 | |
| Hálv barnagjald - fyri pápan | 4.020 | 335,00 | |
| Vanligt barnagjald - fyri mammunu smb. § 4 | 5.304 | 442,00 | |
| Hálv barnagjald - fyri mammunu | 2.652 | 221,00 | |
| Barnagjald smb. § 14, 1-2 | 8.028 | 669,00 | |
| Økt barnagjald smb. § 14,3 | 13.284 | 1.107,00 | |
| Gjald í smb. við føðing eftir § 5 | 0 | 459,00 | |
| Gjald til uppíhald fyri & aftaná føðing eftir § 5 | 0 | 798,00 | |

* umframt sjúkrakassagjald

# Almannaveitingar pr.1.7.1993

| Frádráttarfríar inntøkuupphæddir | pr. ár |
|---|---|
| **Fólkapensiónlógin** | |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 4,1 | 18.900,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 5,1 nr.2 & 6,2 | 5.200,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 11,2 - hjún | 17.800,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 11,2 - støk | 12.100,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 18,2 | 14.900,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 18,3 | 13.900,00 |
| **Avlamispensiónslógin** | |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 5,1 | 18.900,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 6,2 - grundfrá. | 5.200,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 6,2 - pers. arb. | 14.900,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 8,1 -støk | 9.700,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 8,1 -onnur | 13.900,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 12,2 - hjún | 17.800,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd smb. § 12,2 - støk | 12.100,00 |

**SKJAL 2**

| | 1994 | Regulering 2,70% | 1995 | Regulering 3,11% | 1996 | Regulering 5,60% |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vanlig fólkapensión | 246.282.828 | 252.932.464 | 251.950.355 | 259.786.011 | 251.500.000 | 265.584.000 |
| Avlamis v.m. | 4.281.028 | 4.396.616 | 4.388.904 | 4.525.399 | 4.300.000 | 4.540.800 |
| Vanlig ip | 119.229.936 | 122.449.144 | 124.109.074 | 127.968.866 | 124.810.000 | 131.799.360 |
| Avlamisveiting | 2.213.716 | 2.273.486 | 2.322.294 | 2.394.517 | 2.000.000 | 2.112.000 |
| §9 arbeiðsloysi | 31.725.609 | 32.582.200 | 20.156.902 | 20.783.782 | 37.534.000 | 39.635.904 |
| § 13 varig veiting | 18.464.474 | 18.963.015 | 1.832.150 | 1.889.130 | 2.000.000 | 2.112.000 |
| Ánsinsgarløn | 4.746.191 | 4.874.338 | 4.278.945 | 4.412.020 | 4.732.000 | 4.996.992 |
| Einkjubarnastyrkur | 1.805.997 | 1.854.759 | 1.711.772 | 1.765.008 | 1.647.000 | 1.739.232 |
| Alimentatión | 1.657.200 | 1.701.944 | 1.592.086 | 1.641.600 | 200.000 | 211.200 |
| Einkjupensión | 2.099.836 | 2.156.532 | 2.286.202 | 2.357.303 | 1.989.000 | 2.100.384 |
| Íalt | 432.506.815 | 444.184.499 | 414.628.684 | 427.523.636 | 430.712.000 | 454.831.872 |
| Meirútr. | 11.677.684 | | 12.894.952 | | 24.119.872 | |
| Kommunupartur | 788.244 | | 870.409 | | 1.628.091 | |
| Landskassapartur | 10.889.440 | | 12.024.543 | | 22.491.781 | |

SKJAL 5

**Prístalið, 1.1.1983=100,0**

| | | | Miðaltal fyri juli til apríl | %-broyting frá miðaltali til miðaltal | árlig %-regulering |
|---|---|---|---|---|---|
| | 1.jul. | 114,60 | | | |
| | 1.okt. | 118,50 | | | |
| 1988 | 1.jan. | 117,10 | | | |
| | 1.apr. | 117,00 | 116,80 | | |
| | 1.jul. | 118,30 | | | |
| | 1.okt. | 122,20 | | | |
| 1989 | 1.jan. | 121,30 | | | |
| | 1.apr. | 124,20 | 121,50 | 4,02 | 4,02 |
| | 1.jul. | 127,40 | | | |
| | 1.okt. | 131,40 | | | |
| 1990 | 1.jan. | 130,50 | | | |
| | 1.apr. | 131,50 | 130,20 | 7,16 | 7,16 |
| | 1.jul. | 132,70 | | | |
| | 1.okt. | 135,30 | | | |
| 1991 | 1.jan. | 135,70 | | | |
| | 1.apr. | 135,70 | 134,85 | 3,57 | 3,57 |
| | 1.jul. | 137,00 | | | |
| | 1.okt. | 141,90 | | | |
| 1992 | 1.jan. | 140,60 | | | |
| | 1.apr. | 139,10 | 139,65 | 3,56 | 3,56 |
| | 1.jul. | 139,50 | | | |
| | 1.okt. | 140,30 | | | |
| 1993 | 1.jan. | 138,70 | | | |
| | 1.apr. | 147,90 | 141,60 | 1,40 | 1,40 |
| | 1.jul. | 150,00 | | | |
| | 1.okt. | 149,60 | | | |
| 1994 | 1.jan. | 148,30 | | | |
| | 1.apr. | 149,00 | 149,23 | 5,38 | 5,38 |
| | 1.jul. | 151,70 | | | |
| | 1.okt. | 155,20 | | | |
| 1995 | 1.jan. | 153,80 | | | |
| | 1.apr. | 155,70 | 154,10 | 3,27 | 3,27 |
| | 1.jul. | 157,80 | | | |
| | 1.okt. | 157,90 | | | |
| 1996 | 1.jan. | 157,80 | | | |
| | 1.apr. | 158,50 | 158,00 | 2,53 | 2,53 |
| | 1.jul. | 160,10 | | | |
| | 1.okt. | *161,00* | | | |
| 1997 | 1.jan. | *161,90* | | | |
| | 1.apr. | *162,80* | 161,45 | 2,18 | 2,18 |
| | 1.jul. | | | | |

*1.okt. 1996, 1.jan. og 1.apr. 1997 er mett eftir miðalvøkstrinum pr. ársfj. frá 1.ársfj. í 1995 til 2. ársfj.1996)*

| | | |
|---|---|---|
| *til meting av okt.96, jan.97 og apr.97* | *1,35* | *(frá apr 95 til jul 95)* |
| | *0,06* | *(frá jul 95 til okt 95)* |
| | *-0,06* | *(frá okt 95 til jan 96)* |
| | *0,44* | *(frá jan 96 til apr 96)* |
| | *1,01* | *(frá apr 96 til jul 96)* |
| | ***0,56*** | ***í miðal*** |

SKJAL 4.

| Prístalið | Grundvektir 1.7.1975 | Vektir 1.1.1983 | Broyting 75-83 |
|---|---|---|---|
| Breyð og mjøl | 4,39 | 4,01 | -9 |
| Kjøt | 10,23 | 9,38 | -8 |
| Fiskur | 3,95 | 4,12 | 4 |
| Mjólk, fitivørur og e | 10,58 | 8,87 | -16 |
| Frukt og grønmeti | 3,76 | 4,78 | 27 |
| Eplir | 1,85 | 2,03 | 10 |
| Søtmeti | 3,97 | 2,30 | -42 |
| Aðrar matvørur | 0,69 | 0,75 | 9 |
| Drekkavørur | 2,77 | 3,12 | 13 |
| Tubbak | 3,76 | 2,86 | -24 |
| Rúskdrekka | 1,84 | 1,54 | -16 |
| Klæði og skógvar | 10,20 | 7,99 | -22 |
| Vask og snák | 3,32 | 3,30 | -1 |
| Búnyttir | 8,18 | 6,57 | -20 |
| Olja og ravmagn | 10,49 | 18,93 | 80 |
| Býli | 10,98 | 10,94 | 0 |
| Aðrar vørur | 9,04 | 8,50 | -6 |
| **Tilsamans** | **100,00** | **100,00** | 0 |

| **Høvuðs-bólkar** | **Vektir** 1.1.1983 |
|---|---|
| Matvørur | 39,37 |
| Klæðir | 7,99 |
| Orka | 18,93 |
| Býli | 10,94 |
| Aðr. vørur | 22,77 |
| **Prístalið** | **100,0** |

*Kelda: Hagstova Føroya*

| **Danska brúkaraprístalið** | Vektir jan.1991 |
|---|---|
| Fødevarer | 14,45 |
| Drikkevarer | 3,90 |
| Tobaksvarer | 2,73 |
| Beklædning og fodtøj | 5,71 |
| Bolig | 21,46 |
| Brændsel, el, gas, varme | 6,99 |
| Boligudstyr, husholdningstjen. | 6,51 |
| Helseudgifter | 1,79 |
| Transport | 15,45 |
| Telefon og porto | 1,74 |
| Fritidsudstyr, underholdning | 9,47 |
| Andre varer og tjenester | 9,80 |
| **Varer og tjenester i alt** | 100,00 |
| **Heraf** | |
| Varer | 56,65 |
| Tjenester | 23,62 |
| Husleje | 19,73 |

*Kelda: Statistiske Efterretninger, nr. 1, 1996*

SKJAL 5

**Tímaløn hjá arbeiðsmonnum og prístalið, 31.12.1986 - 1.1.1996**

| Løn kr./tíma | 31.des. 1985 | 31.des. 1986 | 31.des. 1987 | 31.des. 1988 | 31.des. 1989 | 31.des. 1990 | 31.des. 1991 | 31.des. 1992 | 31.des. 1993 | 31.des. 1994 | 31.des. 1995 | 1.jan. 1996 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsmenn | | | | | | | | | | | | |
| utt. frít. o.t. 1 | 61,2 | 62,1 | 65,4 | 69,4 | 73,2 | 75,2 | 75,9 | 75,9 | 75,86 | 75,86 | 75,86 | 75,86 |
| við frít. o.t. 2) | 67,0 | 68,4 | 72,6 | 77,7 | 82,7 | 85,0 | 85,7 | 85,7 | 84,39 | 84,39 | 84,39 | 84,39 |
| **Prístalið** | 117,6 | 112,4 | 117,1 | 121,3 | 130,5 | 135,7 | 140,6 | 138,7 | 148,3 | 153,8 | 157,8 | 157,8 |

1) Grein 1,a í sáttmála millum FA og FAG (tímalønin við 0,9% frá 1.5.1989)
2) Frítíðarløn íroknað (1983–86: 9,5%, 1987: 10,25%, 1988: 11%, 1989: 12%, síðan 1.5.1993: 10,25%) og íroknað 1% til sosialan tryggingargrunn (frá 1.5.1989).

**Indeks fyri tímaløn og prístal, 31.12.1985 = 100**

| | 31.des. 1985 | 31.des. 1986 | 31.des. 1987 | 31.des. 1988 | 31.des. 1989 | 31.des. 1990 | 31.des. 1991 | 31.des. 1992 | 31.des. 1993 | 31.des. 1994 | 31.des. 1995 | 1.jan. 1996 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| tímaløn utt. frí. | 100 | 101 | 107 | 113 | 120 | 123 | 124 | 124 | 124 | 124 | 124 | 124 |
| tímaløn við frí. | 100 | 102 | 108 | 116 | 124 | 127 | 128 | 128 | 126 | 126 | 126 | 126 |
| Prístalið | 100 | 96 | 100 | 103 | 111 | 115 | 120 | 118 | 126 | 131 | 134 | 134 |

**Indeks fyri tímaløn og prístal, 31.12.1985 = 100**

